# Kirkjuráðsformaðurin harmast um støðuna

*Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, skilir ikki, at annar av sóknarprestunum í prestagjaldinum sýtir donskum bispi at prædika í Vesturkirjuni á Hvítusunnu*

John Johannessen

– Eg haldi tað vera ógvuliga harmiligt, at danski bispurin, Jan Lindhardt, ikki sleppur at prædika í Vesturkirkjuni á Hvítusunnu, eins og ætlað.

Hetta sigur Sjúrður Poulsen, formaður í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, eftir at tað er komið alment fram, at Bergur Debes Joensen hevur sýtt fyri, at danski bispurin skal fáa loyvi at prædika í kirkju hansara.

Bispur sendi herfyri prestum í teimum stóru kirkjunum bræv við tilboði um at lata norðurlendskar bispar prædika kring landið annan Hvítusunnudag. Bisparnir koma til Føroya í sambandi við stóra hátíðarguðstænastu fyri túsund ára haldinum fyri kristniboðan Føroya Hvítusunnudag.

Tilboðnum hava Bergur Debes Joensen, sóknarprestur í Vesturkirkjuni, og Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer, sóknarprestar í Klaksvík, saman við kirkuráðnum í Klaksvík, víst frá sær. Grundgevingin er, at bisparnir í 1997 hava skrivað undir eitt skjal, ið loyvir donskum prestum at halda serliga guðstænastu fyri at staðfesta samkynt paraløg.

**Hevði ivaleyst prædikað Guðs orð**

Grundgevingina heldur kirkjuráðsformaðurin fyri Vesturkirkjuna, Sjúrður Poulsen, lítið um. Hann sigur seg vera vísan í, at Jan Lindhardt hevði prædikað Guðs orð og ikki talað fyri samkyndum paralag, slapp hann at prædika í Vesturkikjuni á Hvítusunnu. Harafturat heldur hann, at kirkjufólkið sjálvt er ført fyri at meta um eina prædiku.

Men kirkjuráðsformaðurin kann kortini ikki gera nakað við avgerðina hjá Bergi Debes Joensen.

– Bispur sendi tilboðið út til prestarnar, men ikki til okkara, tí hava vit als ikki viðgjørt spurningin, sigur hann og vísir á, at tað er Hans Jacob Joensen, bispur, ið hevur gjørt av, at danski bispurin ikki skal sleppa at prædika í Vesturkirkjuni, eftir at Bergur Debes Joensen hevur mótmælt.

Hin sóknarpresturin í Vesturkirkjuni, Heri Jógvan Joensen, hevur ikki svarað tilboðnum frá bispi. Hann vísir á, at tað í tilboðnum stóð, at prestarnir skuldu siga frá sum skjótast, eru teir ímóti, at nakar av teimum útlendsku bispunum prædikar í Føroyum. Og tá hann ikki er ímóti hesum, lat hann vera við at svara.

**Stíðast um smálutir**

Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður, heldur, at prestarnir í Føroyum í alt ov stóran mun leggja seg efir at stríðast um smálutir, ið lítlan og ongan tídning hava fyri trúarlívið í Føroyum. Hann vísir á, at kirkjan heldur átti at savnast um at hjálp, har á stendur, í staðin fyri at nýta meginpartin av orkuni til at stríðast.

– Smáu trupulleikarni, stríðst verður um í Føroyum, eru einki afturímóti stóru neyðini, vit síggja aðrastaðni í heimi, sigur Sjúrður Poulsen.



*Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður í Suðurstreymoyar Vestara prestagjaldi skilir ikki, at annar av sóknarprestunum skal vera í móti, at danskur bispur prædikar í Vesturkirkjuni 2. hvítusunnudag*

# Aftur til New York

*Gongst eftir ætlan, fara tríggjar av føroysku modellunum aftur til New York um knappan mánað*

Jákup Mørk

Fyri stuttum vóru tær tríggjar, Gunnvá Patursson, Malan í Jákupsstovu Magnussen og Óluvá Johannessen, í New York, har tær saman við átta øðrum føroyskum gentum luttóku í stórari altjóða modellkapping.

**Stór broyting**

Nú stendur teimum trimum í boði at fara aftur til New York, men hesu ferð verður steðgurin nakað longri, og talan verður ikki um nakra kapping.

Nei, tær tríggjar skulu í tríggjar mánaðir royna seg hjá ávíkavist Elite Models og Click Models, og er hetta fyrsta úrslitið av luttøku teirra í MAAI.

Tað er sjálvandi íslendska Kolla, sum stendur aftan fyri tær tríggjar, og hon dylir ikki fyri, at hon er ógvuliga spent um, hvussu ferðin hjá teimum trimum fer at hepnast.

- Serliga eri eg spent uppá, hvussu tær tríggjar takla tíðina har yviri, og ikki minst, hvussu tær megna yvirgongdina frá lítla heimliga dunnugarðinum til heimsins størsta súrepli, sigur Kolla.

Samstundis greiður Kolla frá, at hetta eisini er forsmakkur hjá gentunum uppá, hvussu tilveran verður, um tær skulu skapa sær eina framtíð innan mótaheimin. - Talan er fyrst og fremst um hart arbeiði, so glansibíløtini, sum mong hava av hesi tilveruni, eru rættuliga veruleikafjar, sigur Kolla. Hon leggur afturat, at tá tey seinast vóru í New York, vóru føroysku genturnar 11 í tali, men at tær tríggjar nú mugu royna seg á egnum beinum.

Óluvá og Gunnvá skulu arbeiða saman hjá Elite, meðan Malan verður hjá Click, men tær fáa tó høvi at síggja hvørja aðra, tí arbeiðsplássini liggja tætt við hvørt annað.

**Long tíð**

Spurd um tað ikki er við øgiligum spenningi, at hon nú fer aftur til New York, svarar Gunnvá, at tað er tað sjálvsagt, men hon dylir kortini ikki fyri, at tríggir mánaðir er long tíð.

- Her verður tað einki við at leingjast heim eftir mammu, tá einir tíggju dagar eru farnir, men í so máta er tað í øllum førum gott, at vit eru tríggjar, sum fara avstað, heldur hon fyri.

Annars leggur hon dent á, at hon er sera glað um tann stuðul, sum hon hevur fingið heimanífrá, at bæði mamman og pápin gleða seg hennara vegna. Drongurin er tó kanska eitt sindur hugtungur, heldur hon við einum sorgblídnum smíli, og hyggur yvir á Finn Hansson, sum drongurin eitur.

Sum nevnt, so gongur leiðin til New York um knappan mánað, um alt gongur eftir vild, men fyri fyrst fáa tey bæði møguleika at hugna sær eitt sindur saman. Fríggjadagin fara tey til Íslands, har tey verða komandi vikurnar, áðrenn nýggja starv hennara fyri fyrst skilir tey at í eina tíð.





*Óluvá Johannessen og Gunnvá Patursson eru tveir av føroysku gentunum, sum um slakan mánað fara til New York*

**Mynd: 3‘arin**

# Norðurlendsk ráðstevna í psykiatri

Føroya Pleygarafelag, sum er limur í einum norðurlandasamstarvi, skipar fyri norðurlendskari ráðstevnu innan psykiatri um vikuskiftið

Rástevnan verður í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum leygardagin 20. mai kl. 13.30 — 16.00

Sjúrður Norðbú, formaður í Føroya Pleygarafelag, sigur, at luttakarar koma úr Noreg, Svøríki, Finlandi og Danmark.

Fyrilestrarhaldarar verða:

Eyðun Joensen — psykologur

Sofus Joensen — psykiatari

Jens Folgersen — frá FOA í Danmark

Ráðstevnan er almenn, og øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.




Anja Andersen
í Føroyum

Fríggjadagin kemur heimskenda hondbóltsstjørnan Anja Andersen til Føroyar.
Vitjanin er fingin í lag av formula.fo, ið hevur samstarv við høvuðsstuðulin, Fujitsu Siemens, hjá Slagelse Forenede Håndboldklub, har Anja Andersen er venjari.





Anja skrivar autografar
á torginum í SMS leygardagin 20. mai frá kl. 11:00 til 13:00
Øll eru vælkomin!

Lesið annars meira um vitjanina á www.formula.fo

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS
formula.fo

Sosialurin - 311820